# uttan vit og skil



*- Eingin fer at gera íløgur undir slíkum umstøðum, sum eru afturvendandi, ár undan ár. Tú kanst valla áseta ein fund, tá ið samráðingar eru millum fakfeløg, og tað byrjar at sansa at, tí tú veitst ikki, um fólk yvirhøvur sleppa til fundar, sigur Marner Lisberg, vinnulívsmaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

frá restini av føroyska samfelagnum, sigur hann.

Marner vísir á, at føroyska samfelagið er lítið, og øll eru vit meira ella minni knýtt at hvørjum øðrum.

– Eru arbeiðarafeløgini í verkfalli, noyðast skipini, sum menninir hjá konunum á hesum virkjum sigla við, av landinum við fiskinum. Og øvut; liggja skipini, so fáa konurnar hjá fiskimonnunum ongan fisk til virkingar.

Nevndarformaðurin í P/F Sandoy Seafood og P/F Delta Seafood, heitir tí staðiligа á myndugleikar og fakfeløg um saman at finna loysnir, soleiðis at útjaðarin ikki verður so skilaleysa hart raktur í stríði millum partarnar.

– Eg endurtaki, at hetta avgjørt má vera seinastu ferð, at vit lata slíkt óskil taka okkum á bóli, sigur Marner Lisberg.

# Kaj 2 í Miðlahúsinum




ÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Í samband við at annað bindið í ævisøguni um Kaj eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard verður útgivið verður útgávuhald í Miðlahúsinum í dag klokkan 16.00.

Blaðstjórin bjóðar vælkomin, Osmund Justinussen, reiðari fer at siga nøkur orð um bókina og høvundurin fer at signera bøkur.

Løtan verður rikað við sangi frá manning av Dupultkvartettini og Odvør Skarðhamar sissar svongdina.

Tað eru 11 mánað millum permurnar á fyrsta og øðrum bindi av ævisøguni um Kaj Johannesen, sum nú telir 910 síður. Fyrsta bindið um Kaj kom út 24. november í fjør, annað bindið 20. oktober í ár.

Hesuferð snýr søgan fyri tað mesta seg um seinna heimsbardaga og hvussu Kaj og hansara menn strevaðust undir krígnum.

Seinni heimsbardagi var ein sonn gulltíð fyri teir sum sigldu og bóru boð í bý. Aftast í bókini er eitt yvirlit yvir hvat teir, sum sigldu hjá Kjølbro vunnu í krónum og oyrum túr fyri túr í tíðarskeiðnum frá 1941-44. Eitt nú var persónliga inntøkan hjá Kjølbro í 1942 1,3 millión krónur.

Tað er forlagið Hellurnar, sum gevur bókina úr og hon kostar 399 krónur í bókabúðunum. Bókin kann eisini keypast beinleiðis frá forlagnum við at fylla seðilin út, sum varð sendur í hvørt hús og senda hann inn til forlagið, tá kostar hon 349 krónur. Til ber eisini at seta seg í samband við Forlagið Hellurnar á telefon 223143 ella 322800. Eisini ber til at bíleggja á teldupostinum; justinus@post.olivant.fo

# Sellofan á Glyvrum




*Nú fáa runavíkingar eisini møguleika at síggja væl umtóka leikin, Sellofan*

**Sum liður í Mentanarvikuni í Runavík, verður sjónleikurin Sellofan spældur í fimleikahøllini á Glyvrum leygarkvøldið 22. og sunnukvøldið 23. oktober**

SJÓNLEIKUR
*tíðindaskriv*

Sellofan er um ta modernaðu kvinnuna Elin, sum roynir at uppfylla ta kvinnuligu fyrimyndina um at megna bæði karrieru, mann, tvey børn og ein alt ov stóran og dýran bil. Nú er hon tó komin fram á eina grein í einum vælumtóktum kvinnublað, sum vísir, at hennara sexlív er ógvuliga keðiligt fyri eina kvinnu í hennara aldri. Greinin kemur við uppskotum til loysnir uppá hetta, og ein av loysnunum er, at hon skal lata seg í sexut undirklæði og pakka seg inn í Sellofan, sum ein gáva til mannin at uppdaga!

Tað er væl óneyðugt at siga, at leikurin Sellofan er ein skemtileikur! Leikurin fevnir um ein einstakan dag, har skemaið er so stramt, at ein seinkan um morgunin uppá bert 15 minuttir hevur vanlukkuligar avleiðingar á alt tað, hon skal náa: heimið, barnagarðin, kontórið, mammuna, og ta lagnumiklu forføringina í Sellofan um kvøldið!

Leikurin verður framførdur á ein óhátíðarligan hátt, oftani beinleiðis vendur til áskoðarirnar, nakað á sama hátt sum »stand-up comedy«.

Sjónleikurin byrjar kl. 19.30 bæði kvøldini. Atgongumerki á 125 kr. fáast á Kunningarstovunum í Runavík og Havn og í Norðurlandahúsinum.

Tað er Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu, sum saman við Grímu, skipar fyri tiltakinum.

# Hetlendingar taka støðu um Smyril Line

SMYRIL LINE
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var í gjár, at hetlendski menningargrunnurin, Shetland Development Trust (SDT), skuldi taka støðu til sína størstu einstøku íløgu, nevniliga at seta 4,7 miljónir pund í føroyska felagið, Smyril Line.

Hesin peningur skal verða við til at hjálpa Smyril Line at keypa meirilutan í norska felagnum, Fjord Line.

Sosialurin royndi fyrrapartin í gjár at fáa viðmerkingar um útlitini fyri, at hetlendski menningargrunnurin fer at játta peningin.

Vit ringdu til Thomas Magnusen, nevndarformann í P/F Smyril Line, men hann er burturstaddur.

Vit royndu eisini at fáa fatur á Edvardi Heen, sum umboðar Tryggingarfelagið Føroyar í nevndini í P/F Smyril Line, men tað eydnaðist heldur ikki.